# Aqua René á Gøtusandi

**Millum gestirnir á G!Festivalinum var fyrrverandi Aqua oddamaðurin Rene Dif, ið tyktist at hugna sær á Gøtusandi meðan daman hjá honum sang og dansaði við Infernal.**

G!FESTIVALURIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Danski rapparin, sangarin, tónasmiðurin og sjónleik–arin René Dif var millum áskoðararnir, sum Sosial–urin hitti á G!Festivalinum. Ílatin hettutroyggju og við liðina av vinmanninum Martini Restorff hugdi Aqua oddamaðurin at damu síni Stine Kronborg, meðan hon sang og dansaði við danska poppbólkinum Infernal. Hann greiddi ok–kum frá, at fyri hann hevði G!Festivalurin verið ein feit uppliving. Serliga væl hevði honum dámt framførsluna hjá Beth Hart, sum sambært honum var fantastisk. Hann helt eisini, at karmarnir fyri festivalinum í eini lítlari bygd og á eini strond vóru sera hugnaligir, eins og festivalgestirnir eisini vóru hugnaligir.

René Dif, ið seinnu árini hevur roynt seg sum solistur, nýtti høvið at sleppa til Føroyar at vitja vinmannin Martin Restorff, nú Infernal og daman hjá hon–um skuldu spæla. Martin Restorff greiddi okkum frá, at teir báðir høvdu verið vinmenn í nógv ár, og at hetta tí var eitt kærkomið høvi at síggja vinmannin aftur.

René Dif gjørdist millum heimsins størstu popp–stjørnur við dansk/norska bólkinum Aqua og teirra nógvu heimshittum og frísku og stuttligu tónleika–áskoðan. Bólkurin gavst meðan hann enn var á toppinum. Men legði eftir sær tvær fløgur Aquarium og Aquarius, og serliga heimshittini Barbie Girl, Dr. Jones og Turn Back Time, ið seint verða gloymt.





*Meðan Stine Kronborg dansaði á pallinum á Gøtusandi við bólkinum Infernal, stóð sjeikurin René Dif á sandinum og hugdi*

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum



## Redaktiónsleiðari

- Vilt tú mynda dagsskránna í Føroyum?

Á Sosialinum søknast vit eftir einum redaktiónsleiðara, sum skal hjálpa blaðstjóranum í tilrættislegging og framleiðslu av tíðindapartinum av Sosialinum.

Sum redaktiónsleiðari verður tú við til at seta dagsskránna í føroyska tíðindaheiminum, har Sosialurin og Miðlahúsið í dag fevna um ein týðandi part av tíðindastreyminum, har vit gjøgnum fleiri miðlapallar eru við til at mynda føroyska samfelagið.

Vit søknast eftir einum persóni við royndum innan yrkið, sum hevur gott yvirblikk, og sum eisini dugir at planleggja gerandisdagin - tó at nógvir óvæntaðir lutir altíð kunnu stinga seg upp á eini rokmiklari redaktión. Coaching og evaluering av blaðfólkum og arbeiði teirra er eisini týðandi partur av starvinum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella royndir innan tíðindaheimin.

Eitt grafiskt eyga og evni at seta upp tíðindasíðurnar sjálv/ur er eisini ein fyrimunur, men tó eingin treyt.

Løn sambært avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo.

Áhugaðir umsøkjarar skulu **innan 20. august** senda umsókn og viðkomandi upplýsingar til:
Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Umsóknir kunnu sjálvandi eisini sendast við telduposti til jan@sosialurin.fo

*Sosialurin er ein fyritøka í støðugari menning. Hvønn gerandisdag eru vit á gøtuni við hópin av tíðindum. Blaðið er eisini at finna á alnetinum, har vit eisini røkja tíðindaflutningin á portal.fo, planet.fo og sportal.fo.*
*Á Sosialinum starvast í dag um 25 starvsfólk.*

## Karl Martin Samuelsen og Heri Nolsøe gera kappróðrarsang

Nú útlitini fyri at Klaksvíkingur verður føroyameistari hjá 10. manna–førum á ólavsøku, verður nýggjur sangur skrivaður til bátin. Tað eru hittmakararnir Karl Martin Samuelsen og Heri Nolsøe, ið standa aftan fyri sang–inum.

Hesir báðir hava sam–starva um mangt hittið og hava m.a. vunnið hópin av tónleikakappingum. Heri Nolsøe hevur skriva orð og lag á nýggja kappróðrar–sanginum, og tað er Karl Martin, ið saman við manningini á Klaksvíkingi syngur lagið.

liðugt skal miksast fyrsta dagin, Páll kemur upp 1. august meingin av hon kemur út í september, øðrvísi, hava gjørt sum um, perkussion, ger tað avbjóðandi skula seta seg inn í leiklutin, fær ikki sætt objektivt, havi roynt eftir førimuni at hildið meg til stílin hjá Páll, haldi tað er ok, viss e man ikki er við í upprunanum, hatta er Páll sum hevur gjørt, hetta er ikki so nógv merkt, skal vera við Vísumenn á summarfestivalin, og við Annfinn, fungeri sum kórsangari og spæli onkran kassagittara sum á fløguni, hjarnar spælir undir hjá Anfinn, nokkso nógv fyri framman

Hjarnar á ovasøku, ymiskt annað í stoypiskeiðini. Skal havi júst gjørt ein nýggjan kappróðrarsang í studio í kvøld, 10 mannafarinum heri nolsøe,

## Gott mið til ólavsøku–næturnar

Uppi við Skótahúsið við Havnará hevur kommunan eisini fríðkað um økið, nú ólavsøkan er í nánd. Í fyrstu atløgu varð hetta pettið av ánni tømt fyri vatn, og síðani er gosvatnið shinað eitt sindur upp, soleiðis at tað nú tykist mest sum spildur–nýtt. So ivaleyst er talan her um gott mið, um leitast skal niðan í Viðarlundina, tá tað onkra ólavsøkunátt er vorðið fríggingarmyrkt.



*Mynd: álvur*